# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Sitat úr onkrum blaðið ella sum onkur hevur sagt íð er við í einari grein hjá okkum í dag ella ein stuttur stu*

*Xxxxxxx Xxxxxxxx um okkurt*

## Borðið bindur

Løgmansrøða hevur fingið lemjandi atfinningar frá andstøðuni. Hetta halda vit er eitt sindur órættvíst. Víst er ikki óvanligt, at samgongufólk rósa, meðan andtøða finst at eini løgmansrøðu. Núverandi løgmaður helt seg heldur ikki aftur við sínum hvøssu atfinningum, tá hann sat í andstøðu. Tað vil so vera og vit hava her onga sum helst skyldu at verja samgonguna. Hinvegin halda vit tað vera eitt sindur órættvíst at skíra løgmansrøðuna fyri politiska svadu og at siga hana vera skizzofrena. Ikki tí at vit meta orðið sum nakað ókvæmsorð, men tí, at vit meta hetta vera eitt sindur órættvíst. Røðan er heilskapað og als ikki uttan visjónir. Hon er eisini eyðkend av, at tað er og hevur verið rættiliga góður polititiskur arbeiðsfriður hesi árini. Og hetta var júst eitt endamál við hesi samgongu, at hon skuldi skapa arbeiðsfrið og stabilitet, nakað sum bæði vinna og einstaklingar suffaðu eftir undir tí trubulentu fullveldissamgonguni. Sagt verður, at løgmanssrøðan bert er ein politisk svada uttan visjónir. Hetta er ikki heilt rætt. Visjónir snúgva seg um annað enn fullveldi. Visjónir snúgva seg m.a. um eisini um gerandisdagin hjá vanligum fólki, og hetta var júst nakað av tí, sum henda samgongan legði dent á, tá hon legði frá landi. Hinvegin hevur formaður Tjóðveldisfloksins rætt í, at politiskar visjónir skulu ikki orðast av embætisfólki. Er hetta so, er tað átaluvert, tí sjálvandi skulu visjónirnar orðast av politikarunum sjálvum. Hinum kemur lítið gott burturúr – tað hava vit sæð við eitt nú "Hvítubók", sum í stóran mun júst var eitt (frálíkt) embætismannaog serfrøðingaavrik uttan politiska kjølfestu.

Men sum sagt er nógv áhugavert í løgmansrøðuni, sum viðkemur vanligum fólkum og teirra dagliga lívi. Víst verður á, at húsaprísirnir hækka. Tað kostar nú so nógv at keypa sær hús ella íbúð í miðstaðarøkinum, at tað nærum er vónleyst hjá ungum familjum, skulu tær ikki at binda seg fíggjarliga til langt inn í ellisár. Oljuprísirnir eru methøgir, og tí er tungt at húsast hjá nógvum familjum og hjá eldri fólki. Løgmaður lovar at gera nakað við hetta, og lovar, at familjan fer at standa fremst í raðfestingunum á komandi fíggjarlóg. Bústaðarpakkin, sum Landsstýrið fer at leggja fram, fer at gera tað lættari hjá ungum fólki og familjum at seta búgv og fer eisini at betra um møguleikarnar hjá fólki við serligum tørvi at fáa sær egnan bústað. Hetta fer at verða gjørt við tveimum lógaruppskotum - einum um lutaíbúðafeløg og einum um bústaðapartafelag. Skipanin við lutaíbúðafeløgum ger tað lættari hjá fólki við lægri inntøkum at seta føtur undir egið borð. Somuleiðis fara eldri fólk at kunna skifta hús síni um við minni bústaðir. Við hesum gerst bústaðarmynstrið fjølbroyttari. Lógin um bústaðapartafelag fer at skipa Húsalánsgrunnin og Íbúðagrunnin í eitt alment partafelag, sum skal fíggja bústaðir til fólk við serligum tørvi.

Landsstýrið fer at gera tað møguligt hjá lesandi at fara í barnsburðarfarloyvi, so at korini hjá teimum gerast betri og farið verður undir at leggja barnafrádráttin um til eitt útgjald. Hetta merkir, at eisini tey, sum onga arbeiðsinntøku hava, fáa barnastuðul. Umframt hetta ætlar Landsstýrið at hækka stuðulin til barnafamiljur við serligum tørvi. Landsstýrið fer at leggja fram uppskot um sjúkradagpeningalóg, sum fer at gera, at tímalønt fáa betri møguleikar at vera heima hjá sjúkum børnum, og eitt uppskot um felags foreldramyndugleika fyri at styrkja støðuna hjá bæði børnum og foreldrum. Hetta kann bert vera at fegnast um, men samstundis mugu vit ávara um, at her er talan um sera stór og kostnaðarmikil lyfti, sum andstøðan hevur skýrt at vera beinleiðis vallyfti. Skal andstøðan ikki fáa rætt, so má og skal samgongan fremja hesi lyfti á ein sømiligan hátt. Hetta merkir, at tað má ikki henda, at samgongan í evstu løtu samtykkir neyðugu lógirnar fyri síðan at lata fíggingarspuringin yvir til eitt komandi landsstýri. Borðið bindur, og alt má vera púra klárt, tá henda samgonga um ikki so langa tíð fer til val.

**Sosialurin**

VIÐMERKING

# Trygdin í SEV í hásæti

**KLÆMINT WEIHE**
Stjóri í SEV



SEV hevur alla tíðina trygdina fremst í huganum. Tí er tað at rongja sannleikan, tá fyrrverandi umboðsnevndar formaðurin í SEV, Hans Tausen Olsen, í samrøðu við Sosialin roynir at billa fólki inn, at trygdin í SEV er ein tikkandi bumba. Hans Tausen Olsen vindur trygdarspurningin upp í ein ellubita, og tí skal her verða greitt frá ymsu trygdarøkjunum í SEV.

Eg vísi staðiliga aftur, at trygdin í SEV er ein tikkandi bumba. Tað hevur altíð verið gjørt nógv burturúr, at ásetingar í lóggávuni verða fylgdar. Hans Tausen Olsen vanvirðir og eyðmýkir í samrøðuni tey mongu dugnaligu starvsfólkini, sum enn eru í SEV, eins og hann við sínum orðalagi eisini fer illa við ráðgevum okkara.

Eg kenni einki til, at fyrrverandi umboðsnevndarformaður hevur gjørt vart við vansar og manglar í trygdarskipanini í SEV, hvørki fyri mær persónliga, á stýrisfundum ella á umboðsnevndarfundum. Hvønn serkunnleika sipað verður til, er mær eisini ókunnugt.

### Trygd – hvat meinar hann við?

Í samrøðuni verður spurningurin um trygd fløktur soleiðis saman, at tað besta eg kann gera, er at greina spurningin eitt sindur nærri.

### Trygd – hvat er trygd í SEV-høpi?

Tá tosað verður um trygd, má hetta definerast nærri á ymsu trygdarumráðunum.

### Brunatrygd

Er tað Brunatrygdin tosað verður um, eru anleggini hjá SEV projektera soleiðis, at ásetingarnar í Brunalógini verða fylgar. Føroyskir og danskir serfrøðingar hava eftirkannað skipaninar, og Sundsverkið er ikki eitt undantak í so máta. Seinastu árini er bøtt munandi um brunatrygdina á Sundi v.m., tá tveir stórir transformarar vóru fluttir úr maskinhøllini.

### Arbeiðaravernd

Er tað trygdin hjá starvsfólkunum, tað snýr seg um, er m.a. talan um arbeiðaraverndarlógina.

Tær ásettu skipaninar í lógini við trygdarnevnd, trygdarbólkum og trygdarumboðum vóru settar í verk fyri mongum árum síðani og hava virkað væl. Vit eru spardir fyri stórvegis skaðar, tí trygdin áhaldandi er í hásæti.

### Sterkstreymslógin

Tá tað snýr seg um elveitingarøkið, er tað sjálvsagt sterkstreymslógin, sum hevur stóran týdning. Danska sterkstreymsreglugerðin, sum eisini er galdandi í Føroyum, hevur neyvar ásetingar um trygdina. SEV fylgir hesum ásetingum, og broytingar í reglugerðini koma í gildi í Føroyum samstundis sum í Danmark.

Fyri at økja trygdina á hesum øki hevur "Sikkerhedsstyrelsen" sett í gildi eina SKS – skipan við gildi frá 1. okt. 2005, og sum skal verða sett í verk í seinasta lagi 1. okt. 2006. Dansk Energi ger eina telduskipan til endamálið, sum "Sikkerhedsstyrelsen" kann góðtaka, og sum elfeløgini síðani kunnu nýta - eisini SEV.

Hetta er sama skipan, sum fyri fleiri árum síðani var sett í gildi fyri góðkendar elinnleggjarar. Endamálið er at seta trygdina í hásæti við at skráseta alt, sum verður gjørt. Ein onnur ISO 9000 skipan og sostatt eitt amboð, sum rakstrarleiðarin skal nýta í sínum dagliga arbeiði.

### Eyka máttur

Trygdin í skipanini er eisini tongd at tí eyka motororku, sum er tøk, tá okkurt bilar. Avbyrgdir í Atlantshavi má hesin eykamáttur verða á hóskandi støði. Sum er, er eykamátturin á elverkunum tvær ferðir hámarkslastina. Á kaðal- og linjuøkinum, er so væl útbygt nú, at flestu brúkarar hava meir enn ein streymveitingarmø guleika.

### Veitingarskyldan

SEV er sum kunnugt einasti elveitari í Føroyum. Tað merkir, at SEV hevur veitingarskyldu í øllum landinum. Soleiðis hevur tað verið, og er tað enn. Ein umsókn um streymveiting verður svarað, soleiðis at umsøkjarin fær ávíst eitt íbindingarstað. Treytirnar fyri íbinding kunnu vera ymiskar, alt eftir hvar íbinding ynskist.

### Hendingin ólavsøkumorgun

Eg havi fleiri ferðir kunna um, hvat hendi við streymveitingini Ólavsøkumorgum.

Tá eg havi nevnt, at ávísar mannagongdir og ávísar neyðstreymsskipanir skulu eftirkannast og møguliga broytast, var tað serliga við atliti at kunna seta turbinur og motarar í gongd, tá netið annars var spenningsleyst

*Tórshavn tann 4. august 2006*
*Klæmint Weihe, stjóri*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.